MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Stuðul til yrkisleiklist 2019 - endurlýsing**

Mentamálaráðið lýsir við hesum møguleikan at søkja um stuðul til yrkisleiklist fyri 2019. Lýst varð við freist 15. november 2018, men eftir tilmæli frá Leiklistaráðnum, hevur Mentamálaráðið valt at lýsa av nýggjum.

Umsóknarblað og vegleiðing eru at finna á heimasíðu Mentamálaráðsins: www.mmr.fo undir ”Mentan” – ”Oyðubløð” ella kunnu fáast við at venda sær til Mentamálaráðið.

Viðvíkjandi treytum og møguleikum fyri stuðli verður víst til løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m. og kunngerð nr. 18 frá 19. apríl 2004 um stuðul til leiklist v.m.

Umsóknir, ið vórðu sendar til freistina 15. november, verða tiknar við í viðgerðina. Møguleiki er tó fyri at senda umsóknina av nýggjum ella at senda meir tilfar umframt at boða frá møguligum broytingum.

**Freistin at søkja um stuðul er fríggjadagin 4. januar 2019.**

Umsóknir skulu sendast til:
Mentamálaráðið
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella um t-post til mmr@mmr.fo

**GG!** Stuðul verður latin treytað av, at játtan verður tøk til endamálið á løgtingsfíggjarlógini fyri 2019. Játtanin í 2018 var 650.000 kr.